# 700.000 krónur
## til at marknaðarføra Føroyar

**VisitFaroeIslands hevur sett av upp til 700.000 kr. til serlig átøk at marknaðarføra Føroyar.**

Føroysk virki/feløg kunnu nú søkja um stuðul til marknaðarverkætlanir eftir „krónu fyri krónu"-leistinum.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur. Mesti stuðul er 250.000 krónur.

Verkætlanir hava fyrimun:

- ið eru nýskapandi
- ið eru eitt nýtt framtak
- ið eru á okkara fokusmarknaðum, sum eru lýstir í ætlanini fyri marknaðarføring av Føroyum sum ferðafólkalandi
- har fleiri partar taka lut

Verkætlanir á danska marknaðinum skulu sum meginregla taka útgangsstøði í sniðinum, sum er gjørt til konseptið „tæt på".

Verkætlanir skulu ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini.

Marknaðarføringsætlan og stuðulstreytir fáast á www.mfa.fo og við at seta seg í samband við Per Hansen á 30 61 00.

### Umsóknarblað

Umsóknir skulu sendast til VisitFaroeIslands á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður á www.mfa.fo.

**Umsóknarfreistin er 4. mars 2011.**

visitfaroeislands

Tinganes · 110 Tórshavn

Tlf +298 30 61 00 · Fax +298 30 61 05 · www.mfa.fo

SENDISTOVAN

---

Starvslýsing

# STJÓRNARSKRIVARI TIL TF SAMTAKIÐ

Vilt tú vera við til at bera eitt spennandi samtak framá?
Klárar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn og halda høvdið kalt?
Ert tú analytisk/ur?
Dugir tú at orða teg væl í skrift og talu?
So er eitt spennandi starv at søkja í TF samtakinum.

**Vit kunnu bjóða:**

Eitt fjølbroytt og avbjóðandi starv í einum spennandi samtaki, sum er í støðugari menning. Eitt starv í einum samtaki við greiðum málum, virkisfúsum starvsfólkum og góðum arbeiðsumstøðum. Eitt samtak við fimm ítøkiligum kjarnuvirðum. Har vit hava vilja til lønandi vøkstur, virða heildina, eru ágrýtin og nærløgd, hava eina langtíðarhugsjón og eru broytingarsinnað. Til rætta fólkið hava vit eitt gott og avbjóðandi starv við kappingarførari løn, góðum setanartreytum, sjálvstøðugum arbeiðsøki og góðum møguleikum fyri støðugari førleikamenning, har viðkomandi sjálv/ur verður við til at byggja starvið upp og mynda tað frameftir.

Talan er um nýtt starv, so tillagingar kunnu møguliga ávirka uppgávuinnhaldið. Tann, sum verður settur, má tí kunna tola møguligar broytingar/tillagingar í starvinum.

Stjórnarskrivarin arbeiðir tætt at stjóranum og skal samskipa mál og ráðgeva stjórn og nevnd í TF samtakinum. Stjórnarskrivarin hevur eisini tætt samstarv við sekretariatið í Samtakinum.

**Arbeiðið fevnir millum annað um at:**

- lýsa mál og gera frágreiðingar
- gera innstillingar til nevnd og stjórn
- fyrireika nevndarfundir
- vera við í fyriskipan av tiltøkum og átøkum rundanum stjórn og nevnd

**Vit vænta, at tú:**

- hevur hóskandi hægri útbúgving, t.d. kandidat ella master innan løgfrøði og/ella búskap
- hevur arbeiðsroyndir í minsta lagi svarandi til fulltrúastøði í eini miðalstórari fyrisiting
- hevur kunnleika til føroyskt vinnulív og umsiting
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevnir og vilja
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum

**Lønar-og setanartreytir:**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum.

Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika. Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Regin Hammer, stjóra, við telduposti til rh@trygging.fo ella Mariu á Dul, deildarstjóra, við telduposti til mad@trygging.fo.

Umsóknarfreistin er 11.marts 2011 kl. 12.00.

**Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:**

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TF HOLDING